

*Richard Hollingsworth, nýggjur leitistjóri hjá BP her saman við stjóranum hjá BP í Føroyum, Hjarnar Djurhuus.*
*Mynd Jan Müller*

Nýggi leitistjórin hjá BP:

# -Vit bora aftur í 2004

**Serfrøðingar hjá BP hava seinastu seks mánaðirnar gjøgnumgingið alt tilfarið frá brunnunum boraðir vóru báðumegin markið í fjør. Teir fara nú at brúka komandi hálva árið til at gera sítt kanningarbeiðið liðugt og koma aftur til Føroya á fund við myndugleikarnar og partnararnar her í oktober.**

OLJULEITING Á ATLANTSMÓTINUM
*Jan Müller*

Hóast tað ikki eru tær stóru hendingarnar, ið fara fram í løtuni í sambandi við leiting eftir olju á føroyska landgrunninum, sum henda broytingar av og á innanhýsis í feløgunum, ið arbeiða her. Eitt nú hevur BP fingið ein nýggjan leitingarstjóra “Exploration Manager”. Tað er Richard Hollingsworth, sum hevur arbeitt nógva staðni úti í heimi fyri BP, tey seinastu árini í Norra. Richard arbeiður nú í Aberdeen og hevur fingið litið upp í hendi leiðsluna av leitingini við eitt nú Føroyar. Hann vitjaði herfyri í Føroyum og hevði fund á skrivstovuni hjá BP saman við fleiri av serfrøðingunum hjá felagnum. Teir gjørdu støðuna upp eftir boringina í fjør og tað kanningararbeiðið, sum hevur verið gjørt eftir tað. Eisini var fundur við Oljumálastýrið.

Vit spurdu Richard Hollingsworth, hvussu tað kann bera til, at eitt so roynt og professionelt felag sum BP heilar tvær ferðir, Svínoy og Assynt, rakar skeivt ella mistulkar seismikkin í einum øki, har teir jú frammanundan hava funnið oljufeltini Foinaven og Schiehallion.

-Vit mugu ikki gloyma, at hóast her er talan um eitt øki, Atlantsmótið, og Foinaven og Schiehallion liggja í sama basengi, so liggja hesi feltini í einum heilt øðrum parti av basenginum, har jarðfrøðin er nógv øðrvísi. Vit mugu heldur ikki gloyma, at boringarnar í Føroyum og nær markinum eru á nógv djúpri vatni. Vit kenna hetta eisini aftur frá øðrum basengum kring alla verðina, í Norðsjónum og í Meksikanska flógvanum, har tú fer frá grunnum vatni og út á djúpt vatn. Tá broytist støðan eisini nógv. Tí haldi eg ikki, at vit eiga at verða so ovfarin kortini.

Richard Hollingsworth sigur, at teir sjálvandi høvdu ymisk prospekt tvs. mál at fara eftir, tá teir settu út í kortið. Teir mettu, at Svínoy og Assynt vóru tey frægastu málini at fara eftir tá.

Hann sigur víðari, at teir hava enn ikki gjørt upp, hvar teir fara at bora næstu og triðju ferð í føroyska lisensinum. –Vit hava hesar seinastu seks mánaðirnar gjøgnumgingið alt tilfarið frá brunnunum. Har vóru nøkur yvirraskilsi, og tí máttu vit endurskoða kanningarnar og eisini gera okkara sammetingar við hinar brunnarnar, har fund eru gjørd, av nýggjum.

Richard Hollingsworth leggur aftrat, at teir fara nú at brúka komandi hálva árið til at gera sítt kanningarbeiði av nýggjum liðugt og koma aftur til Føroya á fund við myndugleikarnar og partnararnar her í oktober.

Uppá fyrispurning hvønn týdning komandi metingarbrunnurin hjá Amerada Hess í bretskum øki hevur fyri arbeiðið hjá BP og Shell sigur Richard Hollingsworth, at hetta er sjálvsagt ein áhugaverd boring, men hon er ikki so týdningarmikil fyri teir sum referancupunkt, tí hon liggur so tætt við. Hon fer kanska at geva nakað av data, sum BP kann hava áhuga í men neyvan tað heilt stóra. Hann leggur so aftrat, at tað er heldur ikki vist, at teir fáa atgongd til teir upplýsingar, sum komandi boring hjá Hess fer at geva.

## Bora í 2004

Hann vísir annars á, at BP hevur ongar ætlanir um at bora kanningarbrunnar í føroyskum ella bretskum øki hvørki í ár ella næsta ár. Men helst verður borað aftur í 2004. Teir fara helst bara at bora tann eina av teimum báðum brunnunum, sum teir hava bundið seg til. Men tað hevur so eisini samband við tað arbeiði, sum verður gjørt nú tíðliga næsta ár. -Vit vilja sleppa undan at bora tveir brunnar, sum er bundnir av hvørjum øðrum. Triði brunnurin verður so boraður í 2005, sum er seinasta loyvisárið í 1. útbjóðing.

Hvat er so fyribils úrslitið av evalueringini av teimum báðum boringunum, Svínoy á føroyskum øki og Assynt á bretskum øki. Richard Hollingsworth sigur: -Brunnarnir vísa meira enn nakað annað, at har er nógv meira av sandi í skipanini enn mett. Tí er tað rættiliga týdningarmikið fyri okkum at kortleggja sokallað “seals” í smáluttum. BP fer at tulka seismikkin umaftur og hava teir eisini í kvittanum at útvega sær nýggj data. Teir hava m.a. fingið seismikktilfar frá Agip, sum so hevur fingið okkurt annað afturfyri.

Vit spurdu Richard Hollingsworth, um teir hava hugt eftir øðrum pørtum av tí útbjóðaða Føroyaøkinum, nú teir einki funnið í fyrstu boring síni. Hann sigur, at áðrenn teir buðu í 1. útbjóðing, kannaðu teir stóran part av føroyaøkinum. Síðani teir boraðu ein brunn í oktober hava teir bert hugt eftir sínum egna lisensi. Har skal nógv arbeiði gerast aftrat.

Uppá fyrispurning um BP hevur hugsað um at koma sær uppí onkran annan lisens í 1. útbjóðing sigur Richard Hollingsworth, at hetta er ikki nakað teir hava tosað um, men hann viðgongur, at hetta sjálvandi er ein møguleiki.

-Agip stendur enn fyri meginpartinum av váðanum í sínum loyvi. Kann tað hugsast, at t.d. eitt felag sum BP vil gerast partur av tí lisensinum eisini?

-Eg gangi út frá, at tað er ein møguleiki, sum tó má verða góðkendur av myndugleikunum. Men vit hava ikki hugt at tí møguleikanum. Vit hava heldur ikki fingið nakran fyrispurning.

Vit spurdu Richard Hollingsworth, hvørjar avleiðingar tað fær, nú Shell, sum er partnari hjá BP, er við at keypa upp Enterprise Oil, sum er partur av Statoil-lisensinum?

-Tað fær onga avleiðing fyri BP men bara fyri Shell, tí tað nú er í fleiri loyvum. Tað mugu tit spyrja Shell um. Men eg dugi ikki at síggja, at tað skal hava nakrar broytingar við sær fyri okkara samstarv við Shell, um teir eisini eru í onkrum øðrum bólki.



# BP trýr framvegis uppá Føroyaøkið

**-Hetta er í hvussu so er ikki liðugt. Vit funnu ikki tað vit trúðu, men kortini eru positiv tekin, so tíðin er ikki komin til at tosa um at rigga av á føroyska landgrunninum. Talan er um eitt sera stórt øki, har tað framvegis eru møguleikar at finna nógva olju sigur nýggju leitingarstjórin hjá BP fyri Føroyaøkið, Richard Hollingsworth**



*Jarðfrøðingar og aðrir serfrøðingar hjá BP viðgera úrslitini av kanningunum frá turra brunninum á Føroyaøkinum á skrivstovuni í Havn fyrr í mánaðinum.*
*Mynd Finnur Justinussen.*

OLJULEITING Á ATLANTSMÓTINUM
*Jan Müller*

## Halda fram

Hvat heldur Richard Hollingsworth um alt tað stóra Atlantic Margin økið, sum røkkur heilt úr Írlandi og norð til Lofoten – hvørjar framtíðar møguleikar sær hann her, eftir at fleiri av brunnunum hava verið turrir?

-Uttan mun til tey vánaligu úrslit vit hava verið fyri, so eru vit noyddir til at halda fram við arbeiðinum. Vit steðga ikki leiting í einum øki bara tí, at ein ella fleiri brunnar eru turrir. Nógv arbeiði er at gera, áðrenn vit fara at bora fleiri brunnar. Hann viðgongur tó, at teir hava ikki fingið tað burtur úr, sum teir høvdu roknað við. Tað merkir sjálvandi, at økið er »downgrated«, raðfest lægri, men teir hava so avgjørt ikki avskrivað tað.

-Nú vísti tað seg, at Hess fann olju í nógv djúpari løgum, enn nakar hevði ímyndað sær. Kann hetta fáa avleiðingar fyri tykkara komandi boringar?

-Vit fara sjálvandi at hyggja meira eftir djúpariliggjandi løgum eftir tað úrslitið fyri at vita, um nakað er fara eftir har. Men um vit verða førir fyri at finna prospekt í teimum løgunum í okkara loyvi ber ikki til at siga. Richard Hollingsworth sigur, at teir meta ikki, at tað hevði givið nakað annað úrslit, um teir høvdu borað djúpri í Svínoyarprospektinum.

## Ikki liðugt

Hvussu svartskygdur heldur hann føroyingar eiga at verða eftir fyrstu turru brunnarnar?

-Hetta er í hvussu so er ikki liðugt. Vit funnu ikki tað vit trúðu, men kortini eru positiv tekin, so tíðin er ikki komin til at tosa um at rigga av á føroyska landgrunninum. Talan er um eitt sera stórt øki, har tað framvegis eru møguleikar at finna nógva olju.

Uppá fyrispurning heldur Richard Hollingsworth, at tað hevði kanska verið hóskandi av føroyskum myndugleikum at umhugsað eina nýggja rundu eftir, at Agip hevur borað næsta ár, tí tá hava øll feløgini borað brunnar.

Men bleiv hann kløkkur, tá Agip útsetti sín brunn! –Eg rokni ikki við at nakað oljufelag vil bora ein brunn í skundi á tí skeiva staðnum.

Richard Hollingsworth heldur framvegis, at tað eru góðir møguleikar at gera verulig fund í føroyskum øki. Hann heldur eisini, at tað hevur stóran týdning fyri økið, at man nú fer undir at menna tað stóra Clairfeltið. Tað kann fáa ringvirkningar fyri alt økið. Tað er umráðandi at gera sær sínar fyrstu royndir, tí talan er um eitt rættiliga torført reservoir. Tað verður so út frá hesi fyrstu framleiðsluni, at man fer at gera sær tankar, um eisini aðrir partar av hesum risastóra oljufeltinum kunnu fara undir framleiðslu.

Richard Hollingsworth er sera fegin um skrivstovuna hjá BP í Havn. –Høvdu vit havt so góðar umstøður í Aberdeen, hevði tað verið óført.

BP fer so helst at bora aftur í 2004. Um talan verður um eitt fund, so ganga fýra ár, áðrenn fyrsta oljan spríkir upp. Tvs. at vit skriva 2008 ella 9, áðrenn BP í fyrsta lagi kann fara undir oljuframleiðslu í Føroyum.

# BP nýggja risaíløgu við markið

OLJUFRAMLEIÐSLAN Á ATLANTSMÓTI
*Jan Müller*

Um sama mundið, sum óvissa enn ræður um møguleikarnar at gera nýggj oljufund á Atlantsmótinum, fer bretska oljufelagið BP nú undir eina nýggja útbyggingarætlan av øðrum av teimum báðum stóru oljufeltunum skamt frá føroyska markinum. Talan er um at gera eina íløgu uppá góðar 2 milliardir kr. í oljufeltið Schiehallion. Hetta verður so tann fjórða útbyggingin av feltinum síðani tað varð funnið í 1993 og fór undir framleiðslu í 98. Talan er um at bora fleiri nýggjar brunnar og knýta hesar við hátøkniútbúnaði á havbotninum til framleiðsluskipið á Schiehallion feltinum. Útbyggingin krevur so eisini ymsar ábøtur á skipið og útbúnaðin har. BP hevur søkt um loyvi til útbyggingini hjá DTI og bíðar nú eftir svari. Verður tað nøktandi er ætlanin at fara undir útbyggingina á vári næsta ár. Fyrsta oljan frá hesum nýggja partinum av Schiehallionfeltinum er væntandi í oktober næsta ár.

Mett verður at oljufeltið goymir nærum hálva milliard tunnur av olju og telist tað millum tey bestu feltini hjá BP á landgrunninum. Eitt skifti var framleiðslan frá feltinum 115.000 tunnur um dagin. BP og Shell eiga hvør síni 33,35% av feltinum, Amerada Hess eigur 15,669%, Murphy, OMV og Statoil hvør síni 5,877%.

Fyri Føroyar hevur tað eisini týdning, at BP heldur fram við at gera íløgur í síni oljufelt skamt frá markinum. Tað er við at virðisøkja økið og byggja upp ein infrastruktur, sum møgulig føroysk oljufelt í framtíðini eisini kunnu fáa brúk fyri og lut í. Annars verður eisini í løtuni arbeitt við at byggja út hitt stóra oljufeltið í økinum, Clair.

# BP stórar uppsagnir í Skotlandi

UPPSAGNIR
*Jan Müller*

Leiðslan í BP hevur kunngjørt, at meira enn 800 fólk verða uppsøgd. Her er fyrst og fremst talan um kontraktarar tvs. fólk, sum arbeiða hjá fyritøkum, ið gera arbeiðsuppgávur fyri BP. Uppsagnir hava verið væntandi, tí BP vil minka um útreiðslurnar og annars fremja rationaliseringar. Farið verður undir at brúka sokallaða »flúgvandi arbeiðsbólkar«, sum fara frá palli til pall at gera ummælingaruppgávur heldur enn at hava fasta manning til hesar uppgávur á hvørjum palli. Uppsøgnir verða í fleiri býum í Skotlandi, úti á pallunum og eisini á stóra oljuterminalinum Sullom Voe. Tað er annars stór misnøgd millum oljufeløg eftir at stjórnin hevur hækka oljuskattin við 10%. Hinvegin vísa fakfeløg á, at skatturin oljufeløgini gjalda í Onglandi er bert helvtina av skattinum, sum norska stjórnin krevur inn.